# Kunning til arbeiðsgevarar í samband við at eftirlønir skulu skattast við inngjald

Løgtingið hevur samtykt at broyta lógina um eftirløn (Rentutryggingarlógin), soleiðis at frá 1. januar 2012 verður eftirløn skattað, tá hon verður inngoldin. Tað, sum verður inngoldið frá 1. januar 2012, verður so útgoldið aftur óskattað.

## Allar eftirlønir skulu gjaldast umvegis afturhaldsskipanina hjá TAKS

Lógarbroytingarnar áseta, at allar eftirlønir skulu flytast umvegis afturhaldsskipanina hjá TAKS, soleiðis at 40% av inngjaldinum kunnu afturhaldast til landskassan.

Fyri at skatta eftirlønir við inngjald, er neyðugt hjá TAKS at gera eina skipan, sum kann afturhalda 40% av inngjaldinum til landskassan. Hetta verður gjørt við at nýta verandi A-skattaskipan. Soleiðis skulu allir arbeiðsgevarar eftir 1. januar 2012 flyta eftirlønina eftir somu skipan, sum vanliga lønin verður flutt. TAKS roknar so 40% av til landskassan og flytir hini 60% til eftirlønarveitaran hjá løntakaranum.

Hóast lógarbroytingin ikki kemur í gildi fyrr enn 1. juli 2012, fyri tær eftirlønaruppsparingarm sum liggja hjá útlendskum veitarum, skulu eftirlønaruppsparingar hjá útlendskum eftirlønarveitarum longu frá 1. januar 2012 gjaldast gjøgnum eftirlønarskipanina. Fram til 1. juli 2012 verður øll eftirlønarupphæddin flutt óskattað víðari til uppsparingina, men hareftir verða 40% afturhildin í skatti og 60% send víðari.

### Legg til merkis!

Tað er sera umráðandi, at eingin arbeiðsgevari frá 1. januar 2012 flytir eftirlønir á sama hátt sum áður. Allar eftirlønir, eisini tær sum verða goldnar til útlendskar veitarar, skulu gjaldast gjøgnum afturhaldsskipanina hjá TAKS. Arbeiðsgevarar, ið ikki gera sambært lógini, ábyrgdast at gjalda eftirlønarskattin til landskassan.

## Ymisku lønarskipanirnar, ið arbeiðsgevarar nýta

Arbeiðsgevarar nýta ymiskar lønarskipanir. Niðanfyri er lýst, hvussu arbeiðsgevararnir skulu fyrihalda seg, í mun til ta lønarskipan teir nýta.

## Lønarportalurin ella manuelt fluttar lønir

Arbeiðsgevarar, ið nýta lønarportalin í netbankanum, ella flyta lønir manuelt við at lata lønarlista inn til bankan at avgreiða, skulu framyvir gera hetta við at gera tvær flytingar samstundis: Eina vanliga lønarflyting, har A-inntøka, forvunnin upphædd og frítíðarløn verða flutt, og so eina afturat, har eftirlønargjaldið verður flutt.

Flytingin av eftirlønini verður gjørd við at seta 0,01 sum A-inntøku og eftirlønarupphæddina sum forvunna upphædd. Hendan seinna upphæddin verður flutt til eftirlønarkonto hjá løntakaranum. Út frá hesari konto, og út frá tí, at A-inntøkan er sett til 0,01, sær skipanin hjá TAKS, at talan er um eftirlønargjald, sum skal skattast eftir lógini um skatting av eftirlønum við inngjald.

## Lønarskipanir frá Nema - Lundin

Arbeiðsgevarar, ið nýta lønarskipanir frá Nema, verða komandi dagarnar kontaktaðir um forritstillagingar og broyttar mannagongdir í samband við løn- og hópflytingar.

## Formula Føroyar – Løttløn

Fyrstu viku í januar setir Formula seg í samband við kundar, ið nýta Løttløn.

## Elektron

Elektron ger neyðugar broytingar í lønarskipanini og kunnar kundarnar um hesar. Elektron kunnar eisini kundarnar, um tað gerst neyðugt hjá kundunum at gera tillagingar í verandi skrásetingum.